# Nevndir fáa vegleiðing

**Ein nýggjur bóklingur kann veita virkjum eina hjálpandi hond at skipa seg á besta hátt**

NEVNDARARBEIÐI

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Hvussu skipar eitt felag seg á bestan hátt, er ein spurningur, sum hevur verið nógv umrøddur í londunum kring okkum. Nú hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag gjørt ein bókling, nevndur Nevndararbeiði, sum er ein vegleiðing um, hvat nevndararbeiði snýr seg um.

At bóklingurin er viðkomandi og helst hevur stóran áhuga, vísa tøl frá Skráseting Føroya. Tilsamans vóru 1757 feløg skrásett við ársenda 2002. Av teimum vóru 520 partafeløg og 1286 smápartafeløg. Nógv tey flestu eru smá feløg. Bóklingurin er fyrst og fremst ætlaður verandi og komandi leiðslum á meðalstórum virkjum í Føroyum, men lýsir eisini nøkur formlig krøv til feløg, sum smærri virkir kunnu fáa gagn av.

– At gera ein svarlista um virkisleiðslu og nevndararbeiði er ikki ráðiligt og heldur ikki ætlanin. Men vónandi verður hesin bóklingur íblástur hjá teimum leiðslum, ið vilja viðgera evnið nærri, verður sagt í innganginum til bóklingin.

Í bóklinginum verða mest viðkomandi lógarkarmarnir á økinum umrøddir. Tað verður gjørt fyri at vísa, at krøv eru til nógv formlig viðurskifti, ið leiðslur eiga at uppfylla.

Evnið var frammi á Vinnudegnum í fjør, og tá var ein arbeiðsbólkur settur at hyggja at virkisleiðslu. Í bólkinum hava sitið Jógvan E. Ellefsen, Rúni M. Hansen, Malan Johansen, Jan Mortensen, Anfinn Olsen, Sofus Poulsen og Klaus Rasmussen.

Uni Arge hevur ritstjórnað bóklingin, sum er umbrotin á Vasti og prentaður hjá Estra.

# Løgmaður ivast í lógarsmíði

**Løgmaður ivast stórliga í, um lógin um persónsupplýsingar byggir á góðan lógarsið. Tað gjørdi hann løgtinginum púra greitt mikudagin, tá munnligir fyrispurningar vóru á lofti. Lógin má broytast kortini, tí hon samsvarar ikki við ætlanirnar um ein føroyskan virðisbrævamarknað, sigur hann**

PERSÓNSUPPLÝSING

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Við lóg skal land byggjast, stendur yvir hurðini í Tinglýsingarskrivstovuni, sum húsast í Føroya rætti. Hendan spurning viðgjørdu Anfinn Kallsberg, Kristian Magnussen og Høgni Hoydal mikudagin í løgtinginum*

Málið um persónsuppplýsingar, sum hevur ført til, at Elektron hevur stevnt landsstýrinum, tí teirra Gjaldskipan steðgar upp, hevur fingið politisk bein at ganga á.

Eftir áhaldandi trýst frá bæði vinnuni og politisku skipanini, hevur løgmaður spurt seg fyri hjá løgmálaráðnum, sum nú hevur svarað honum. Løgmaður heldur svarið vera nøktandi, og sostatt fær málið ongar avleiðingar fyri Høgna Hoydal, landsstýrismann við lógarmálum. Men lógin gevur kortini løgmanni stórt høvuðbrýggj.

– Eg ivist framvegis stórliga í, um hendan lógin samsvarar við góðan lógarsið, serliga tí at tað í eini lóg, sum skal tryggja persónsupplýsingar, verða tikin serlig vinnupolitisk atlit, sigur Anfinn Kallsberg.

## Tingsins vilji

Tað er serliga hetta, at vinnupolitisk atlit liggja í buktini, sum hevur fingið ilt í aðrar politikarar og hevur fingið Elektron at stevna. Dáturáðið hevur nevniliga staðfest, at trygdin hjá hinum einstaka er í góðum hondum í Gjaldskipanini, sum í sambandi við pengaflytingar sendir persónsupplýsingar til Danmarkar.

Kortini hevur Høgni Hoydal lýst eina kunngerð, ið steðgar skipanini. Løgmaður heldur kortini ikki, at Høgni Hoydal kann lastast.

– Tað skerst ikki burtur, at tingsins vilji hevur verið, at landsstýrið skal tryggja, at sum mest av peningasamskifti millum føroyingar í Føroyum skal fara fram innan okkara landoddar. Hinvegin tykist tað í dag ógreitt, um ein meiriluti í løgtinginum í dag tekur undir við teirri lóg, sum varð samtykt á løgtingi á sinni, sigur Anfinn Kallsberg.

Nú ynskir løgmaður ta lógina, sum alt rokið stendst av, broytta.

## Má broytast kortini

Alt bendir á, at lógin má broytast undir øllum umstøðum.

Løgmaður vísir á, at stovnsetanin av einum føroyskum virðisbrævamarknaði, sum verður tengdur at útlendskum marknaði, krevur, at persónsupplýsingar kunnu flytast av landinum. Reglurnar í verandi lóg samsvara heldur ikki við reglurnar í samstarvssáttmálanum millum Føroyar og Ísland, sum verður arbeitt við í løtuni.

– Eg ætli tí at taka málið upp í samgonguni fyri at kanna um undirtøka er fyri at leggja málið fram aftur fyri løgtingið, sigur Anfinn Kallsberg.

Sambandsflokkurin hevur longu lagt eitt uppskot fyri løgtingið um at broyta lógina, men í løgtinginum mikudagin fekst eingin ábending um, hvørja lagnu tað uppskotið fær. Avgerandi verður helst, hvørja støðu Fólkaflokkurin fer at taka. Jógvan á Lakjuni, sum eisini er formaður í Rættarnevndini, dróg á bæði.

– Spurningurin er, um vit verja vinnuna ella upplýsingar í hesi lógini. Kanska blanda vit tingini saman. Men eg haldi tað vera rætt, at vit royna at varðveita persónsupplýsingar í Føroyum. Í øllum førum tá ið talan er um flytingar, sum fara fram í Føroyum, sigur Jógvan á Lakjuni.

## Jánkasligt svar

Tað var Kristian Magnussen úr Javnaðarflokkinum, sum reisti spurningin í løgtinginum mikudagin. Hann hevur gjørt seg til talsmann hjá Elektron og peningastovnunum, og hann var alt annað enn nøgdur við svarið hjá løgmanni.

– Løgmaður melur uttan um tað sentrala. Enn einaferð spyr hann tann ákærda, um hann er sekur. Vit kundu havt eina vón um, at hann hugdi eftir rættartrygdini. Hetta málið snýr seg um eina fyritøku, sum hevur fingið loyvi at menna eina skipan, og nú verður tað loyvi undirgrivið. Fólk og fyritøkur mugu hava eina trygd fyri, at tey virka í einum rættarsamfelagi, sigur Kristian Magnussen.

# Tinglýsing uttan eftirlit

**Forsetin í Eystara landsrætti heldur tað vera eitt mistak, at hann hevur eftirlitið við tinglýsingini sambært lógini. Tað kennir føroyska løgmálaráðið einki til. Í næstum verður tinglýsingin bjóðað út til føroyskar fyritøkur**

TINGLÝSING

*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er forsetin fyri Eystara landsrætt, sum hevur eftirlit við føroysku tinglýsingini sambært lógini. Hann skal ansa eftir, at ásetingar í lógini verða hildnar. Millum annað stendur, at tinglýsingin í edv-skránni skal vera atkomulig á internetinum. Tað er hon ikki, og spurningurin er tí, hvør hevur ábyrgdina av, at lógin ikki verður hildin.

Sosialurin hevur vent sær til forsetan í Eystara landsrætti í eini roynd at fáa málið útgreinað. Skrivstovustjórin hjá forsetanum, Nanna Blach, upplýsir, at tey hava fingið at vita, at tað er ein misskiljing, at tey hava fingið eftirlitsmyndugleikan.

»Jeg kan i den anledning oplyse, at Østre Landret fra Justitsministeriet tidligere har fået oplyst, at det fra det Færøske Landsstyres side er meddelt, at det beror på en ekspeditionsfejl, når det i lagtingsloven om tinglysning er oplyst, at Østre landsret fører tilsyn med tinglysningsreglerne, og at landstyret forventer at fremsætte et forslag til ændring af lagtingsloven om tinglysning så vidt muligt inden udgangen af 2003«, skrivar Nanna Blach, skrivstovustjóri í Eystara landsrætti í einum teldubrævi tann 10. november.

Hetta samsvarar ikki heilt við tað, sum Høgni Hoydal landsstýrismaður segði í løgtinginum mikudagin. Tá segði hann, at føroyska løgmálaráðið, sambært tí sum er upplýst honum, ikki hevur givið Eystara landsrætti boð um, at nøkur grein í lógini ikki skal takast í álvara.

Lógin sigur greitt, at upplýsingarnar skulu vera atkomiligar á internetinum. Hóast lógin gongur á fjórða ári, so er hetta lógásetta kravið ikki uppfylt enn. Tingbókin er skrásett hjá CSC-Danmark, og hon liggur ikki á internetinum. Nú lovar Høgni Hoydal at fáa málið í rættlag.

– Fyri at halda lógina er best, at vit fáa gjørt eina skipan í Føroyum. Útbjóðingartilfar er gjørt til eina føroyska skipan, sum sjálvandi skal vera á internetinum, tí tað sigur lógin. Útbjóðingartilfarið verður sent út í næstum, síðan koma boðini inn, og so verður skipanin sett í gongd, sigur Høgni Hoydal, sum tekur alla ábyrgd av, at tinglýsingin enn ikki er førd í eina føroyska telduskipan.



# Havsbrún byggir út fyri 30 milj. krónur

**Tær átta velguga høgu siloirnar, sum settar eru upp á Havsbrún í Fuglafirði, eru nú allar komnar upp at standa. - Væntandi verður alt arbeiðið liðugt í hesum árinum, sigur tekniski leiðarin á Havsbrún, Yngvi Lava Olsen**

ÚTBYGGING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Siloirnar, sum teljast millum hægstu bygningsverk í Føroyum, eru 35 metrar høgar. Einir 200.000 bóltar eru í øllum silounum tilsamans*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Siloirnar á Havsbrún eru millum hægtu bygningsverk í Føroyum. Tær eru 35 metar høgar og taka umleið 1000 tons av fiskamjøli hvør.

Yngve Lava Olsen, sum er tekniskur leiðari á Havsbrún, sigur, at uppskipingin av tilfarinum til siloirnar byrjaði um ólavsøkumundið, og síðan hevur verið arbeitt við at seta tær upp. Tað er danska fyritøkan, Assentoft Silo, sum hevur leverað siloirnar og setir tær upp. Hetta er ein fyritøka, sum hevur spesialiserað seg innan hetta slagi av siloum.

– Áðrenn siloirnar komu til landið, varð fundamentið stoypt, men hetta arbeiðið varð nógv tarnað av verkfallinum í vár.

Yngvi sigur, at samlaða arbeiði eisini er seinkað av tí, at verkfallið tarnaði stoypiarbeiðinum.

– Vit vænta, at siloirnar verða klárar at taka í nýtslu við endan av hesum árinum.

Hann sigur, at nú allar eru komnar upp at standa, verður arbeiðið, ið efir er at gera, í sama mun sum higartil ikki bundið at veðurlagnum.

– Tað, sum nú er eftir, er at seta flutningsútbúnaðin upp, sigur hann.

Einir 200.000 bóltar eru í silounum, og tað má sigast at vera eitt velduga stórt tal.

Yngvi sigur, at siloirnar í fyrsta lagi eru ætlaðar til fiskamjøl, men kunnu eisini nýtast til eitt nú hveiti, meis og soya, sum eru rávørur í fóðurframleiðsluni.

– Siloirnar hava einki við fisk at gera, men eru bert ætlaðar til sonevndar pulvurvørur.

Havsbrún framleiðir eini 50.000 tons av fiskamjøli um árið.

Yngvi sigur, at útbyggingin kemur at hava stóran týdning fyri virksemið á Havsbrún.

– Í fyrsta lagi verður hetta ein stórur fyrimunur fyri handfaringina av fiskamjøli, serliga við avskiping. Arbeiðið verður léttari, skjótari, og vit verða minni darvaðir av vindi og veðri, tá ið avskipað verður.

Sum er, hevur Havsbrún ein hóp av mjølkontainarum, sum gera arbeiði nógv truplari, tí handfaringin verður nógv meira.

– Hetta er eitt annað slag av goymslu, sum kemur at gera arbeiðsgongdina nógv léttari, sigur Yngvi Lava Olsen at enda.

Útbyggingin á Havsbrún kostar einar 30 milj. krónur.



*– Hetta er eitt annað slag av goymslu, sum kemur at gera arbeiðsgongdina nógv lættari, sigur tekniski leiðarin á Havsbrún, Yngvi Lava Olsen.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Beta í Saltangará landar Nim og Baldvin

**– Tá ið ein týskur trolarin sum Baldur landar í Føroyum, liggur eisini nakað eftir her. Vit fáa landingina og søluna, so fyri okkum er hetta ein góð loysn, sigur Ábraham Løkin á Fofish**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nim landaði 20.000 pund av havtasku í Saltangará hósmorgunin.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Hósmorgunin landaði P/F Beta tvey skip í Saltangará. Nim, sum er á garnaveiði, hevði 20.000 pund av havtasku og trolarin, Baldur, ið er ein týskur trolarin hevði 100.000 pund av kongafiski úr Irmingarhavinum. Fiskurin hjá Nim fer bæði til føroysk virkir og eisini fer nakað av landinum.

Reiðaríið, sum eigur Baldur, keypir allan kongafiskin, sum verður fluttur úr Føroyum og niður til Týsklands.

## Liggur eftir

Fofish í Saltangará hevur við báðar sølurnar at gera, og Ábraham Løkin sigur, at Baldur landar í Føroyum fyri at sleppa undan siglingini niður til Týsklands.

– Á henda hátt liggur eisini nakað eftir í Føroyum. Vit fáa landingina og søluna. So, fyri okkum er hetta ein góð loysn, sigur hann.

## Beta ger út

Á P/F Beta sigur Ragnar Olsen, at teir taka sær av landingunum, gera skipið útaftur við kassum og syrgja fyri, at fiskurin kemur til keypararnar.

– Vit hava eina stóra transitthøll í bygninginum hjá okkum, og haraftrat hava vit kølirúm í bygninginum hjá Skipafelag Føroya, sum tekur eini 200 tons av fiski, sigur Ragnar Olsen.

*Týski trolarin, Baldur, landaði 100.000 pund av kongafiski úr Irmingarhavinum.*
*Mynd: Vilnund Jacobsen*

